Hoyringsskriv frá Regin Eikhólm vegna Málfelagið 29. oktober 2025 til LM-025/2025 uppskot til løgtingslóg um stavraðið

Hví skulu vit hava stavrað við 34 stavum (nevnt Móðurmálsstavraðið), tað latínska basisalfabetið við 26 stavum, íroknað stavirnar C, Q, W, X og Z, umframt 8 serstavir?

- Málfelagið var stovnað av André Niclasen v. fl., og virkið 2000-2020. Eitt av aðalmálunum hjá Málfelagnum hevur altíð verið, at vit skulu hava fult stavrað, íroknað stavirnar C, Q, W, X og Z, tvs við 34 stavum í alt.
- Sjónarmiðið hjá Málfelagnum um Móðurmálsstavraðið byggir á fleiri atlit lýst niðanfyri.

Eitt søguligt baksýn vísir, at C, Q, W, X og Z eru ein náturligur partur av stavraðnum

- Stavirnir C, Q, W og Z eru at finna í okkara elstu skriftum, *Seyðabrævið* frá 1298, skr. Í FØ, hevur bæði C, W og Z.
- Tey 6 *Húsarvíkabrøvuni* 1402-07, hava Q, og *Hammershaimb* hevði sjálvur X.
- Í 1891 gav Føringafelagi út bóklingin *Førisk A B C og LESINGABÓK*, har tað á s. 5 var fult føriskt alfabet við C, Q, W, X og Z.

Tey serkønu í føroyskum máli siga, at C, Q, W, X og Z hoyra heima í føroyska stavraðnum og at stavraðið, sum so, einki hevur við málfrøði at gera

- Jógvan í Lon Jacobsen og Hjalmar P. Petersen, báðir professarar í føroyskum máli, umframt Eivind Weyhe (sáli), málfrøðingur og leiðari av føroyamálsdeildini á Setrinum í mong ár, og the grand old man í føroyskum máli, Jeffrei Henriksen, draga allir somu línu sum Málfelagið
- Teir serkønu siga, at eitt alfabet er ein praktiskur listi við teimum bókstøvum, sum eru í brúki í einum máli, m.a. sum samskiftismiðil og í undirvísing í natúr- og medisinskum fakum (fakmál) við meira. Tí hoyra C, Q, W, X og Z heima í føroyska stavraðnum.
- Tá Málstevnunevndin var farin til verka í 2007, eftirspurdu teir uppskot til komandi málpolitikk. Málfelagið gjørdi tá - í tráð við leistin hjá teimum serkønu í føroyskum máli - í viðmerking til Málstevnunevndina vart við, at neyðugt var at verja latínska alfabetið við C, Q, W, X og Z, tí tað var ein týðandi partur av málinum vit brúka til dagligt.
- Nevnast kann eisini, at bæði í Móðurmálsorðabókini og nýggju Rættstavingarorðabókini finna vit í leitiorðum 34 stavir brúktar, íroknað C, Q, W, X og Z, tvs. Móðurmálsalfabetið.

70% av føroya fólki ynskja fult stavrað við C, Q, W, X og Z

- Leistin í Málráðnum í 2013 virdi ikki at fleiri fatanir skuldu koma til orðanna og at fólkið skuldi kenna seg heima í avgerðum hjá Málráðnum. Limurin hjá Málfelagnum, Randi Meitil vísti á, at tey trý, sum vóru fyri fullum stavraði, blivu hildin uttan fyri alt orðaskifti og alla ávirkan í samband við stavraðið.
- Í tí fyrsta 11 manna Málráðum 2013, hevði Málfelagið ein lim, Randi Meitil, sum saman við Eivind Weyhe og Hjalmar P. Petersen, virkaðu fyri fullum stavraði, men meirilutin valdi longu í nov. 2013, at skerja alfabetið við 5 stavum C, Q, W, X og Z.
- Ein stór kanning hjá Lóðúr á vári 2014 vísti, at 70% av føroya fólki tóku undir við fullum stavraði, íroknað C, Q, W, X og Z, tvs. móðurmálsalfabetinum. Harvið umboðar niðurstøðan hjá meirilutanum í Málráðnum nov. 2013, als ikki fólksins vilja.

Málfelagið meinar, at C, Q, W, X og Z eiga at verða partur av føroyska stavraðnum

- Málfelagið metir, at tað er av stórum týdningi fyri Føroya fólk, at vit hava eitt stavrað íroknað C, Q, W, X og Z, ið vit søguliga hava havt í málinum í øldir, tí 70% av fólkinum ynskir tað, og okkara málkønu, vísa á, at tað hevur stóran týdning í alskyns samskifti.
- Móðurmálsstavraðið kunnu allir føroyingar kenna seg aftur í, og tað er longu praktisera í orðabókum, tekstum og málinum yvirhøvir uttan negativar fylgir fyri føroyskt mál.

Vegna Málfelagið - Regin Eikhólm, Tórshavn, 29. Oktober 2025